Viðmerking:

Tunfiskur í føroyskum sjógvi

Í síðstu viku var mikið rumbul í fjølmiðlunum um royndir eftir tunfiski í føroyskum sjógvi. Tað mesta var illgitingar og útspillandi vendingar um meg og felagið Nancy, sum eg eigi partapening í. Hetta byrjaði við at Torbjørn Jacobsen, ting-maður tjóðveldisfloksins, á tingsins røðarapalli, í grovum vendingum, legði meg undir lík og ólíkt. Síðan byrjaði útvarpið, við Jóhann Mortensen á odda, eina sanna útspillingarherferð beinleiðis venda móti mær.

Mær tykir tað tí vera neyðugt at upplýsa um mítt virksemi og at vísa teimum ósannindum aftur, sum hava verið borin fram. Hetta verður gjørt í stuttum brotum niðanfyri.

Spf Nancy

Felagið Nancy varð stovnað í 1986 við endamáli at reka fiskivinnu og hartil hoyrandi vinnu. Við stovnan átti eg 30% av partapeninginum, men havi seinni keypt meirilutan. Eg havi verið nevndarformaður øll árini. Í tíggju ár átti og rak Nancy útróðrarbát, so Nancy er ikki nakar ársungi innan føroyska fiskivinnu.

Tað var ikki av tilvild, men eftir drúgt arbeiði og fyrireikingar, at Nancy í 1997 fekk tilsøgn frá myndugleikum um loyvi at royndarveiða eftir tunfiski við japanskum skipum í føroyskum sjóði (sí meira um hetta seinni).

Útvarpið bar tíðindi um, at Nancy hevur for-vunnið einar 7 mill. kr. í samband við tunfiska-royndirnar, seinni bleiv hetta tal rættað til einar 5 mill. kr. Hesi tøl hava einki við sannleikan at gera, tíverri. Einhvør, sum vil halda seg til sannleikan, kann fara á Partafelagsskrásetingina og síggja roknskapir hjá spf Nancy. Her sæst t.d., at Nancy í 1998 hevði eitt avlop upp á 181.437 kr eftir at 67.716 kr vóru goldnar í skatti. Megin-parturin av hesum avlopið stavar beinleiðis frá tunfiskaroyndum.

Fiskirannsóknarstovan

Í 1978 kom eg í fast starv á Fiskirannsóknar-stovuni og havi verið har síðani, burtursæð frá nøkrum árum, tá eg var í Danmark undir útbúgving. Ein partur av mínum arbeiði á Fiskirannsóknarstovuni hevur verið at skipa fyri ymiskum royndarfiskiskapi, eitt nú eftir búrfiski. Búrfiskaroyndirnar hava tíbetur eydnast væl, og føroyingar eru einsamallir í beinleiðis veiðu eftir hesum fiski í Norðuratlantshavi.

Men eg havi ongantíð arbeitt við tunfiski á Fiskirannsóknarstovuni, so sum Útvarpið vil vera við (sí næsta brot). Fiskirannsóknarstovan hevur verið eitt sindur uppi í royndunum eftir tunfiski, og okkurt tilfar er til taks, m.a. dagbøkur frá føroyskum skipum, sum royndu eftir tunfiski sunnanfyri, umframt onkur smávegis frágreiðing um tunfisk. Hetta tilfar, sum er frá seinnu helvt av 80'unum, havi eg sað, og hetta er atkomuligt á Fiskirannsóknarstovuni fyri einhvønn, sum hevur áhuga fyri tí. So vítt eg veit, eru allar frágreiðingar frá royndarfiskiskapi, sum Fiski-rannsóknarstovan hevur skipað fyri, atkomuligar fyri føroyskar reiðarar/skiparar. Serligt tilfar (specialvitan) á Fiskirannsóknarstovuni hevur ikki á nakran hátt hjálpt mær í mínum arbeiði fyri at fáa tunfiskaveiðu í føroyskum sjógvi upp á føtur. Tilfar, sum eg havi haft atgongd til, og tað hevur ikki verið serliga nógv, hevur í hvussu er eisini verið tøkt hjá einum og hvørjum øðrum. Hinvegin havi eg savnað nógv tilfar sjálvur og eisini latið tilfar til starvsfólk á Fiskirannsóknar-stovuni, sum arbeiðir við tunfiski. Tá eg havi tikist við nakað serligt privat virksemi, havi eg kunnað stjóran og altíð arbeitt við opnum kortum (sí eisini umtaluna í Dimmalætting 30/10-97).

Eg haldi tí fast við, at eg ikki á nakran hátt havi misbrúkt mítt almenna starv til egnan fyrimun. Tvørturímóti hava tær royndirnar, sum eg havi fingið í mínum privata virksemi, gjørt meg betur føran fyri at røkja mítt almenna starv.

Asorurnar

Á middegi 18/2-2000 segði Jóhann Mortensen í Útvarpinum: "Spurningurin at veiða tunfisk í føroyskum øki tók seg upp miðskeiðis í níti-árunum, tá Fiskirannsóknarstovan sendi Bjarta Thomsen á eina ráðstevnu á Asorunum um slík fiskasløg". Hetta er beinleiðis ósatt og kann bert takast sum útspilling av mær. Fiskirannsóknar-stovan hevur ongantíð sent meg til nakra ráðstevnu viðvíkjandi tunfiski.

Í apríl 1993 var eg á Asorunum og hitti danska konsulin, sum eisini er skipsagentur, fyri at kanna um føroysk skip á búrfiskaveiðu kundu arbeiða út frá Asorunum. Eisini varð tosað við granskarar, fyri at kanna um teir høvdu áhuga at gera búrfiskaroyndir saman við føroyingum við Asorurnar. Her var ikki talan um nakra ráðstevnu. Í mars 1995 var eg aftur á Asorunum; hesaferð luttók eg á eini árligari fiskivinnustevnu, framvegis við tí fyri eyga at víðka búrfiska-royndirnar. Á hesi stevnu hittast at kalla øll innan fiskivinnuna á Asorunum og fyrilestrar verða hildnir um nógv evni innan fiskivinnu, eisini um tunfisk. Í mars 1996 varð eg bjóðaður til hesa somu fiskivinnustevnu at halda ein fyrilestur um búrfisk. Í oktober 1996 var eg inni á Asorunum við Magnus Heinason fyri at bunkra og landa búrfisk. Ferðir mínar til Asorurnar vóru gjørdar í samband við búrfisk, og í **ongum føri** havi eg tosað við nakran á Asorunum um tunfisk við Føroyar. Framferðin hjá Jóhann Mortensen má tí kallast lítið sømilig fyri ein journalist í almennum útvarpi.

Føroyskar tunfiskaroyndir

Føroyingar hava í hvussu er tey síðstu 15 árini roynt at sleppa upp í part í tunfiskaveiðu. Fleiri føroysk skip hava gjørt túrar suður gjøgnum Atlantshav fyri at royna hesa vinnu. Eisini bygdi Sylvan Jacobsen í Klaksvík skipið Julius á Bakka við tí fyri eyga at royna tunfiskaveiðu. Tey seinnu árini hevur tað verið Viberg Sørensen, sum hevur tosað mest um tunfisk, og eftir áheitan frá honum blivu fyrst í 90'unum settar av 100.000 kr á almennari játtan fyri at fáa hetta í gongd, men hetta kom ikki víðari.

Eg haldi ikki, eg lúgvi, tá eg sigi, at eg var tann fyrsti, sum bað myndugleikarnar um loyvi, saman við útlendingum, at royna eftir tunfiski í føroysk-um sjógvi. Tá hevði eg útlendsk skip tøk, sum vildu gera royndirnar uttan kostna (sjálvandi við at teir sluppu at eiga veiðuna) og harafturat ganga flestu av okkara treytum á møti, tí teir trúðu uppá, at tunfiskur var í føroyskum sjógvi.

Eg fekk onki svar frá myndugleikunum, men út móti sumri 1996 fekk Fiskasølan loyvi at royndarveiða eftir tunfiski í føroyskum sjógvi. Hetta kom tó ikki í gongd. Út á várið 1997 fekk Fiskasølan sítt royndarloyvi forlongt, men eg fekk noktandi svar. Út á summarið 1997 hevði eg fund við fiskasølustjóran og segði hann tá, at teir komu ikki at gera meira við tunfisk fyribils. Við mikið strev og stríð, og eftir at hava lagt sakina fyri fleiri fólk, har ímillum onkran politikara, játtaði landsstýrismaðurin at enda tann 2. september 1997 at eg (Nancy) kundi sleppa at royndarveiða við tveimum japanskum skipum. Skipini vóru longu á Havnini eina viku seinni eftir observatørum og fiskiskapurin gav sera gott úrslit beinanveg frá byrjan. Sostatt var tað eg, sum fyrstur kom við hugskotinum um at royndarveiða við japanskum skipum í føroyskum sjógvi, og eg taki mær æruna av at hava fingið gongd á hendan fiskiskap. Um onkur kallar hetta at tiltuska sær loyvi, havi eg misskilt týdningin av hesum orði. Eg havi barst fyri eini sak og havi fingið tað at bera til.

Føroysk tunfiskaskip

Tá eg fór at arbeiða við tunfiski, var tað ikki við tí fyri eyga sjálvur at tjena nógvar pengar, men at fáa gongd á eina føroyska tunfiskaveiðu. Líka frá byrjan havi eg haft nógv samskifti við tey reiðarí, sum vildu sleppa at royna seg í tunfiskaveiðuni við føroyskum skipum, og eg havi alla tíðina lagt doyin á at hjálpa teimum ígongd. Fyrsta árið japansku skipini roundu við Føroyar, skipaði eg soleiðis fyri, at táverandi skiparin/eigarin av línubátinum Skútunes, Trúgvi Kallsoy, saman við einum av sínum monnum, kom umborð fyri at síggja hvussu japanar arbeiddu. Drúgt samskifti fór fram, harímillum fleiri fundir - og fyrireiking-arnar hjá Skútunes vóru komnar rættuliga langt, men tíverri doyði Trúgvi alt ov ungur, og hesar ætlanir duttu niðurfyri. Eisini við menninar aftanfyri línuskipið Ágot havi eg haft nógv samskiftið, bæði viðvíkjandi reiðskapi, viðgerð av fiski og marknaði, m.a. á fundi við mínar útlendsku samstarvspartnarar. Ágot kom í gongd við tunfiskaveiðuni, men er fyribils hildin uppat orsakað av syndarligu vanlukkuni, sum kostaði lívið á unga skiparan Pól Eyðfinni Poulsen. Eisini skipaði eg fyri, at skiparin/eigarin av Leitisteini, Hans Andrias Joensen, kundi verða við einum japanskum skipi, áðrenn Leitisteinur fór á tunfiskaveiðu. Eisini fóru tveir av føroysku manningini, sum vóru umborð á japanskum skipi, sum spf Nancy samstarvaði við í 1998, umborð á Leitistein, tá hann byrjaði tunfiskiskap í 1999. Eisini á annan hátt havi eg roynt at stuðla og sett í gongd, m.a. við at samskipa vitjan hjá japanskum útgerðar- og fiskakeyparafeløgum í Føroyum, so hetta kom út til allar, sum høvdu áhuga í tunfiski.

Fiskimálastýrið

Sum nevnt omanfyri tók Fiskimálastýrið í fyrsta umfarið Fiskasøluna fram um Nancy, tá loyvi til royndarfiskiskap varð givið, hóast Nancy hevði arbeitt longri við hesi ætlan og var farin at søkja. Eisini, tá loyvini fyri 1998 vórðu endurnýggjað, fekk Fiskasølan fyrimun; teirra loyvi varð beinanveg endurnýggjað, eftir leisti, sum Nancy hevði snikkað til, meðan Nancy ikki fekk svar fyrr enn langt út á várið. Eisini tók Fiski-málastýrið annað loyvið frá Nancy og gav einum nýggjum felag eftir loyvi. Fiskimálastýrið gjørdi eisini mismun, við tað at loyvið hjá Nancy hevði treytir, sum ikki vóru lagdar á Fiskasøluna. Hetta kom sera illa við hjá Nancy, tí japansku samstarvsfelagarnir alla tíðina vístu á, at teir, sum høvdu byrja hendan fiskiskap, vórðu verri stilláðir enn sokallaðir "newcomers". Sostatt kann ikki sigast, at Fiskimálastýrið hevur "forert" Nancy nakað, men hevur hinvegin givið Nancy verri umstøður at arbeiða undir enn aðrir.

Drúgt brævasamskiftið hevur verið millum Nancy og Fiskimálastýrið í samband við tun-fiskaroyndirnar. Í brævi 18/6-96 verður m.a. skrivað: „ Hetta kann gerast við at Føroya Landsstýri letur loyvi til spf Nancy (sum frammanundan rekur fiskibát), so sum vanligt er aðrastaðni, ella at loyvi verður givið beinleiðis til útlendsku skipini" og í brævi 27/8-97 verður skrivað: „Vit taka tað sum givið, at Landsstýrið skal góðkenna allar mannagongdir og allar sáttmálar" Fiskimálastýrið valdi tó at enda at geva tilsøgn um royndarloyvi beinleiðis til Nancy og hevði ikki áhuga í, hvat var millum Nancy og japanarar.

Sostatt hevur Nancy ongantíð krógvað nakað, men hevur alla tíðina arbeitt við opnum kortum við eittans endamáli - at fáa eina føroyska vinnu eftir tunfiski í gongd.

Fiskimálastýrið eigur rós fyri, at teir sóu tað rætta í at byrja tunfiskaroyndirnar.

Alment — privat

Nógv dømi kunnu nevnast, har alment sett hava virksemi við síðuna av og harvið fáa eyka inntøku. Í nógvum førum brúka tey sín serliga kunnleika og royndir til frama fyri eitthvørt privat virksemi. Og sjálvandi er tað í lagi at hava fastar mannagongdir og fyriskipanir hesum viðvíkjandi. Tað er tó trupult at verja seg fyri øllum, sum kann henda hesum viðvíkjandi. Tí hóast ein starvsmaður ikki luttekur í nøkrum felag, ella hevur annað privat virksemi, so kann hann gera fólki órætt, við serligari hjálp ella upplýsingum til onkrar fram um aðrar. Tað verður tí altíð í síðsta enda rættskafni og samvitskan hjá hvørjum einstøkum, sum avgerð hvat ein kann loyva sær.

Eg eri í fleiri førum biðin um at seta pening í skip. Fleiri ferðir havi eg borið meg undan, ikki tí at eg ikki trúði uppá hesar verkætlanir, men tí at hetta kundi ávirka mítt almenna starv. Men í teimum førum, har eg havi mett, at hesin vandin ikki er til staðar, havi eg ikki hildið meg aftur.

Politisk forfylging?

Tað er sera "óbehagiligt" at verða spiltur út á tingsins røðarapalli og síðan verða úthongdur í føroysku fjølmiðlunum. Álopið frá tjóðveldistingmanninum Torbjørn Jacobsen kemur tó ikki heilt óvantað. Hann hevur brúk fyri at "gartera" viðhvørt, so veljarin ikki gloymir hann, tí í dagliga arbeiðnum er hann ósjónligur.

Eg skrivaði herfyri lesarabrøv ímóti fullveldi og tað er tí nærliggjandi at hugsa, at hetta eisini er ein royndur hjá Torbirni at berja alla móttstøðu niður í hesum sambandi.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum helt, at framferðin hjá Torbirni minti um okkurt við eini sjúku. Hesi kenslu sat eg eisini við og hugsaði, at hatta er muran í monnum sum Torbjørn - teir fáa febur og gerast illa sjúkir, tá teir síggja at onkur fær okkurt at bera til og tjenar pening.

Eftirmæli

Ta viðferð, eg havi fingið í síðstu viku, havi eg tó ikki tikið so tungt, tí eg veit, at eg havi eina góða sak. Eg havi ongum gjørt órætt, men við nærlagni fingið glið á virksemi, sum vónandi kemur øllum føroya fólki til góða. Um hetta arbeiði ikki verð gjørt, hevði "ogn føroya fólks" helst svomið inn og út av Føroyagrunninum, uttan at nakar gáðaði um tað. Nógvur peningur er brúktur, eisini úr almennum grunnum, í royndini at fáa gongd á tunfiskaveiðu. Nú er gongd komin á. Eg havi onki fingið úr almennum køssum til hetta arbeiðið, men harafturímóti goldið nógv inn. Tað eru stórar upphæddir, sum japanar hava lagt eftir seg í gjaldi fyri observatørar, føroyska manning, provianti, olju og tílíkum.

So heldur enn at verða útspiltur báðir eg meg hava tøkk uppiborna. Eg rokni ikki við at fáa nakra umbering fyri grova útspilling, hvørki frá Torbirni Jacobsen í løgtinginum ella Jóhann Mortensen í Útvarpinum, men ein uggi er tað, at nógvir reiðarar og fiskimenn heilsa mær við orðunum — drív á.

Bjarti Thomsen, Argir

Bjarki Thomsen saman við japanarum, sum veiða eftir tunfiski

Ummæli:

Framsýningin Monologar hjá Edward Fuglø í Listaskálanum

Rakel Helmsdal ummælir

Monologar

- leikur - kossur - okskjól - fall - sjóð - elli - sansa - lop - brot -transformatión - roynd - huld - slit - da capo - leikur - leikur - fall - sjóð - skjól - huld - roynd - sansa - lop - brot - leikur - sjóð - fall - huld - kossur - sansa - slit - elli- ok - OK - brot - roynd - transformatión - lop - fall - da capoSS..

Meðan tú gongur oman trappurnar til stóra salin í Listaskálanum, verður tú spakuliga leiddur yvir í ein annan heim, at røddunum,ið teska, siga, deklarera, lesa, spæla, smakka uppá heitini av myndunum, so vart tú blindur, so hevði tú kortini sloppið eitt stig inn við í hina verðinaS..

Vanliga tekur leiklistin myndlistafólkini inn í síni verk, her er tað mótsett: Myndin er vorðin sjónleikur. Ein røð av monologum, einrøðuleikum. Næstan í hvørjari mynd síggjast skráu brettini, og ofta eitt reytt velour-tjald, og um ikki, so heldur tú teg hóma tað í myrkrinum aftanfyri.

Pallurin sjálvur er sjáldan nógv skrýddur, onkuntíð er rúgva av litaðum smásteinum, ein bøkkur av sterktgrønum grasi og trøllakampum, eitt baktjald við gráskýggjutum himmali, ein grótrúgva, ein flatur hylurSSS. Ikki tann stóra pompøsa scenografiin, tí tað er leikarin, sum er í hásæti.

Leikarin er nakin, onkuntíð kvinna, onkuntíð maður, men mest hvørki ella bæði og. Ungur, uttan tað einu ferðina ein gomul kvinna. Leikarin blundar, droymandi ella í djúpari konsentratión um evni, sum verður umrøtt í hvørjum einstakum monologi.

Leikarin spælir ta aldargomlu søguna um Ledu og Zeus í svanahami. Hon hevur sjálvan Zeus í bandi og kínur honum blundandi um nevið við einum fingri, meðan hon smílandi liggur við høvdinum á einum teaturreyðum velourkodda og kroppinum á eini malagrótsrúgvu. Leikarin kysslir ein dreymafisk í einum dreymi við hvítum pierrotandliti og bláum hári, knappliga setandi seg upp í svøvni. Hann ber eitt tungt ok,ið verður sveimandi lætt, tí tað er sett av tí lættasta í verðini: firvaldum! Leikarin fjalir seg í eini tungari kirkjuklokku, ella dettur nakin á hvassari hellu uttan at varnast tað, haldandi í bláari krystalkúlu, uttan tó at lesa framtíðina við blundandi eygum. Starir enn blundandi av pallinum út á tað opna havið, hugsar kanska um at sita bundin av elli við summardáakransi um gráa hárið.

Leikarin sansar grøs og trøllakampar undir iljum og lógvum, loypir í ein 2-dimensionellan hyl, so at vatnið spruttar upp í krúnskapið.

Kemur úr egginum, fyri síðani slanguskapað at krúpa fram handan tjaldið og blundandi spýta lív í ein eiturgrønan trøllakamp.

Hann HYGGUR! Ein roynd at hyggja, eyguni fylgja tær í øllum salinum, og tú, hyggjarin, kennir teg teptan.

Og so søkkur leikarin aftur niður í tann 2-dimensionella sandin, við bindi fyri eyguni og samantvunnum hondum yvir høvd. Kemur við hørðum sliti úr eini hvassari goggu, fyri til endans at sveima í leysari luft yvir pallinum, bláa hárið vavt um ein stav, úr hvørjum drippa trøllakampar, og á skugganum liggur ein blóðreyð dreymsóljaSSSS

da capo - da capo - slit - huld- roynd - transformatión - brot - lop - sansa - elli - sjóð - fall - ok - kossur - leikur - leik - a- kossur - sjóð - ar - fall - sansa - leikur - fall - skjól - sansa - lop - elli - s - ok - huld - roynd - at - transformera - fall - elli- s- -slit - huld- u - kossur - sjóð - lop - sansa - kossur - leikurSSSSSSSS.

Framsýningin Monologar hjá Edward Fuglø tekur teg inn í ein annan heim, hinumegin spegilin kanska? Letur tú teg fara inn í hann, ert tú eina uppliving ríkari, um ikki, so stendur tú uttanfyri og leingist kanska eftir at tora at lata hurðina upp. Myndirnar eru hurðar til hugflogið. og enn eru so fáir dagar eftir áðrenn hurðarnar klamsaSS.

Myndirnar til myndabókina "Veingjaða myrkrið" eftir William Heinesen eru eisini við á framsýningini, og tað er tað vert, at fara niðan at hyggja at upprunamyndunum, tí líkamikið hvussu góðar endurgevingar eru, so er eitt prent ongantíð ein hondteknað mynd.

Monologarnir eru opnir til 27. februar.

Skipara Hansenshús, 24. feb. 2000
Rakel Helmsdal

Burt við lógini um serligt avgjald á brenniolju

Sambandsflokkurin heldur, at tíðin nú er komin til, at Løgtingið í verki sýnir vilja at fremja tiltøk,ið muna hjá øllum húskjum her á landi. Nevniliga at taka av lógina um serligt avgjald á brenniolju. Marjus Dam hevur lagt uppskot fram viðvíkjandi hesum

ÓLAVUR Í BEITI

Í viðmerkingunum til uppskot Sambandsfloksins, sum Marjus Dam hevur lagt fram, verður m.a. sagt, at undir seinastu samgongu vórðu nakrir skattalættar framdir. Á hesum øki er at kalla eiðasørt hjá hesi samgongu, hóast valskeiðið er um at vera hálvrunnið. Sambandsflokkurin heldur, at tíðin nú er komin til, at Løgtingið í verki sýnir vilja at fremja tiltøk,ið muna hjá øllum húskjum her á landi. Nevniliga at taka av lógina um serligt avgjald á brenniolju.

Og Marjus Dam vísur á, at sambært løgtingsfíggjarlógini ár 2000 gjalda húski og vinna 81 mió. kr. árliga. Ein partur av vinnuni og skipum fær síðan sambært lógini endurrindað 11 mió. kr. Nettoútreiðslan hjá borgaranum av hesi lóg er sostatt 70 mió. kr. árliga.

Tyngjandi avgjald

– Við at taka av hesa lóg sleppur einstaki borgarin undan einum rættiliga tyngjandi eykaavgjaldi á brenniolju. Serliga fer tað at lætta um hjá barnafamiljum og har, nógv fólk eru í húsi. Somuleiðis fer tað at lætta um bæði hjá virkjum og almennum stovnum at sleppa undan at umsita hesa lóg.

– Landskassin kemur at missa hesa inntøku, men væntandi fara inntøkurnar at vaksa nakað á øðrum økjum, orsakað av betri trivnaði. Brennioljan er nú so kostnaðarmikil, at ikki er rætt, at Landskassin skal forvinna stórar upphæddir í eyka brennioljuavgjaldi, fíneðan húski kring landi neyvan hava ráð at gjalda fyri at hava fløvan heima.

– Kostnaðurin av hesum uppskoti skal síggjat í ljósinum av einum skattalætta, sum er í samsvari við samgonguskjalið og eisini landskassans risaavlop, sum ætlanin er at nýta til at fíggja komandi nýveldi við, sigur Marjus Dam m.a. í viðmerkingunum.